Nýggj skjal

Hoyringssvar – uppskot til broyting í grannskoðaralóggávu

Grannskoðaraeftirlitið móttók tann 26. november 2020 hesi uppskot til hoyringar:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin),

- Uppskot til løgtingslóg um at seta í gildi Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til lovpligtig revison af virksomheder af interesse for offentligheden, og

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde (fylgibroytingar)

Grannskoðaraeftirlitið hevur umrøtt uppskotini á fundi tann 14. desember 2020, og hevur bert nakrar yvirskipaðar viðmerkingar til ávís viðurskifti í uppskotinum til broytingar í Grannskoðaralógini.

Viðmerkingar til uppskotið til broytingar í Grannskoðaralógini

Viðmerkingar til § 1, nr. 5:

Í § 1 a, stk. 1, nr. 1 verður allýst, hvat ein grannskoðari er. Her verður víst til §§ 3, 10 og 11 í grannskoðaralógini. Men í hesum greinum eru bert ásetingar um løggildar grannskoðarar. Ásetingin viðv. skrásettum grannskoðarum varð strikað úr § 3 við løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015, av tí at krøvini til grannskoðaraútbúgvingina vórðu broytt soleiðis, at tað frameftir bert verður eitt slag av góðkendum grannskoðara t.e. løggildur grannskoðari. Men skrásettir grannskoðarar kunnu halda fram sum skrásettir grannskoðarar inntil góðkenningin verður strikað úr skránni.

Tað kann tí undra, at verðandi skrásettir grannskoðarar ikki verða nevndir í lógaruppskotinum. Mælt verður til, at broyta ásetingina, soleiðis at verðandi skrásettir grannskoðarar, eisini koma undir heitið "grannskoðari". Í øðrum lagi verður mælt til at skriva hetta í serligu viðmerkingunum til § 1 a, stk. 1, nr. 1.

Viðmerkingar í mun til § 1, nr. 59 og 60:

Tað er metingin hjá Grannskoðaraeftirlitinum, at samsýningin fyri arbeiðið í Grannskoðaraeftirlitinum er ov lág. Tískil verður við hesum mælt til, at samsýningin hjá limunum í Grannskoðaraeftirlitinum, verður hækkað.

Við hesum lógaruppskotinum, kann tað eisini gerast ein avbjóðing at fáa persónar við royndum innan grannskoðan og roknskapargreiðslu, sum ikki eru góðkendir grannskoðarar, at taka sæti í Grannskoðaraeftirlitinum, um samsýningin ikki stendur mát við, hvussu týdningarmiklan nevndarsess, talan er um.
Eisini kann nevnast, at í dag kunnu góðkendir grannskoðarar góðskriva fyrireikingar- og fundartíð í Grannskoðaraeftirlitinum sum eftirútbúgvingartímar. Hesa eggjanina til at luttaka í Grannskoðaraeftirlitinum hava persónar, sum ikki eru góðkendir grannskoðarar, sostatt ikki.

Viðmerkingar á s. 32 í uppskotinum:

Í næsta reglubrotið á s. 32 í uppskotinum, stendur m.a. hesin teksturin:

"... Smærri mál verða í framtíðini í størri mun endað við einum boðum ella eini átálu heldur enn sum nú, har málini verða løgd fyri Grannskoðaranevndina og kunnu føra við sær revsing við bót.."

Grannskoðaraeftirlitið metir, at setningurin kann geva lesaranum eina fatan av, at tað hevur verið rættiliga vanligt at leggja mál fyri Grannskoðaranevndina. Hetta er ikki rætt. Tvørturímóti er tað sera sjáldan komið fyri, at Grannskoðaraeftirlitið hevur lagt mál fyri Grannskoðaranevndina.

Grannskoðaraeftirlitið vil tískil mæla til, at hesin setningurin verður tillagaður soleiðis, at hann ikki gevur lesaranum eina skeiva fatan av, hvussu virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum hevur verið.

Málsligar viðmerkingar:
Tað kann verða trupult, at umseta lógartekst úr donskum máli. Tískil hevði tað verið skilagott, at fingið onkran málkønan persón at lesa lógaruppskotið, og koma við málsligum viðmerkingum. T.d. verður orðið "fremja" ofta brúkt, t.d. "fremja grannskoðan". Her hevði verið rættari, bert at skriva "at grannskoða".

Tórshavn, 23. desember 2020

Vinarliga

Rannvá Sólheim

Forkvinna